# Tøvd mynd til søgnina “Marmennil”



**Tilfarslisti:**

- Ull í ymiskum litum, til dømis blátt, hvítt, grønt og annað.
- Tøvipláta
- Tøvinálir
- Møguliga tógvrestir

**Uppgáva:** Ímynda tær, hvussu mermelin sær út. Ger eina mynd har tú vísir, hvussu tað sær út á havsins botni, har mermelin eisini er, hvat hann ger, og hvat annað er har.

**Mannagongd:**



Legg eitt lag av ull á eina tøviplátu. Legg ullina, soleiðis at ullin vendir tvørtur um tøviplátuna. Tað kann til dømis vera hvítt og blátt.



Legg so næsta lagið av ull, men vent ullini soleiðis, at hon vendir mótsettan veg fyrra lagnum.



Prikka til ullin er føst.



Síðan kanst tú tøva tara, fiskar, mermilin, bát og annað. Hugsa um, hvat er aftast á myndini og prikka tað fyrst.

Tað ber til at gera strikur runt um tað, sum skal síggjast væl á myndini. Legg ein myrkan tráð (her er tað myrkamorreytt) og legg tráðin fram við skapinum.



Góðan arbeiðshug 😊